# ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

29. april 2019
Mál: 17/01034-42
Viðgjørt: HEIP

Á fundi í Løgtingsins Trivnaðarnevnd mikudagin 24. apríl 2019 um lm. nr. 145/2018: Uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin ynskti nevndin fleiri upplýsingar um mannagongdir í sambandi við harðskapsstøður og nýtslu av tvingsli, bæði í mun til omanfyrinevnda løgtingsmál og verandi støðu.

Almannaverkið hevur upplýst Almannamálaráðnum, at Almannaverkið hevur ikki enn fyrireikað starvsfólk nágreiniliga til, at ein møgulig tvingsilslóg verður sett í gildi. Tað krevur, at tvingsilslógin verður samtykt og at tað er greitt, hvat lógin fevnir um. Almannamálaráðið hevur somuleiðis ætlanir um kunningarátøk, eftir at lógaruppskotið er samtykt.

Almannaverkið hevur upplýst, at tey hava ment innanhýsis regluverk, almennar og staðbundnar mannagongdir og ásetingar viðv. handfaring av harðskapsstøðum. Hesar reglur eru sprotnar úr alment galdandi neyðrættinum og galdandi lóggávu.

Almannaverkið fyrireikar øll síni starvsfólk til at vera í hóttandi ella harðligum støðum. Í hesum høpi verða øll starvsfólk kunnaði um galdandi reglur um tvingsil, reglur viðv. harðskapi og hvussu starvsfólk skulu handfara slíkar støður og hvørjar mannagongdir eru galdandi.

Í hesum sambandi fáa starvsfólk undirvísing í at handfara tvingsil og harðskap. Undirvísingin snýr seg m.a. um at veita starvsfólki sernámsfrøðilig amboð at nýta til tess at fyribyrgja støðum, har tvingsil annars má nýtast og at veita starvsfólki viðkomandi skeið í ósemjuhandfaring (*konflikthåndtering)*.

Harafturat hevur Almannaverkið nýtt tilfar frá 'Social udviklingscenter (SUS)' í Danmark, har starvsfólk og leiðsla eisini hava luttikið í verkstovum har arbeitt verður við háttaløgum sum fyribyrgja harðskapi.

Eisini verða starvsfólk, ið starvast kring borgarar, ið kunnu hava ein harðligan atburð, undirvíst í sjálvverju, umframt at tey verða útgjørd við kallitóli, soleiðis at tey fáa givið boð frá sær í vandastøðum.

Flest øll starvsfólk, ið starvast innan Trivnaðardepilin í Almannaverkinum, hava fingið tílíka undirvísing. Aðaltátturin í undirvísingini er, at starvsfólk verða før fyri at loysa truplar støður á skynsamasta hátt.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

Sum dømi um almenna mannagongd kring harðskapsstøður kann nevnast, at tá starvsfólk geva fráboðan um harðskap og tvingsil, er mannagongdin tann, at starvsfólkið eisini gevur sær tíð at hugsa um hendingargongdina, ið elvdi til harðskapin og virka fyri, at umstøðurnar verða tillagaðar framyvir soleiðis at byrgt verður fyri vandanum fyri harðskapi.

Í hesum høpi ger leiðslan eisini sínar viðmerkingar til hendingargongdina og tær neyðugu tillagingarnar í umstøðunum kring borgaran verða viðgjørdar í starvsfólkabólkinum saman við leiðsluni.

Serligar staðbundnar mannagongdir eru á teimum bútilboðum, har harðskapsstøður ikki eru óvanligar. Hesar mannagongdir eru gjørdar við atliti at teimum borgarum, ið har búgva og ítøkiligu umstøðunum á staðnum.

Slík mannagongd kann eitt nú snúgva seg um, hvar starvsfólk skulu stilla seg í einum ávísum rúmi, soleiðis at tey altíð eru før fyri at sleppa til rýmingar. Eisini kann slík mannagongd snúgva seg um at í minsta lagi tvey starvsfólk fara inn til ein ávísan borgara, tá honum tørvar eitthvørt, ella at serlig mannagongd er skipað fyri ávísan borgara í mun til hansara serligu støðu og hvussu støðan verður handfarin á skynsamasta hátt.

At enda skal leggjast afturat, at Almannaverkið støðugt roynir at basa harðskapsstøðum og at nýta so lítið av tvingsli sum yvirhøvur gjørligt. Dentur verður lagdur á fyribyrgjandi háttaløg, sum m.a. snúgva seg um at taka borgaran við upp á ráð, ið er ein táttur, ið er fyribyrgjandi í sjálvum sær. Ásannast má tó, at støður kunnu íkoma, har neyðugt er at nýta tvingsil fyri at verja starvsfólk og fyri at verja borgaran sjálvan, ikki bara í harðligum støðum, men eisini í mun til trygd, heilsu og trivnað hjá borgaranum.

Vinarliga

E. Samuelsen

Eyðgunn Samuelsen

Landsstýriskvinna

/Eyðun Mohr Hansen